VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 13.06.2023 kl. 18:00 |
| **Fundarstaður:** | |
| **Málnr.:** | 21/00003 |
| Til staðar: | Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Dagbjørn Hansen, Rósa Samuelsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Jens Gaardlykke, Herborg Gaardlykke |
| Varalimir: | Martin Simonsen og Jóhannus Hansen |
| Ikki til staðar: | Sólfríð Jacobsen og Jóanis Albert Nielsen |
| Aðrir partar: | |
| Fundarskrivari: | Jóhan Hendrik Ellefsen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Kunning** | | | |
| 7/23 | 23/00041-8 | Mál beind í nevnd 6-23 | 3 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 38/23 | 23/00302-2 | Støðutakan til roknskapin fyri 2022 | 4 |
| 39/23 | 20/00549-23 | Umsókn um nýtt byggiloyvi á matr. nr. 417g í Vatnsoyrum | 5 |
| 40/23 | 21/00061-7 | Uppskot til skipan av økinum á Valloyruni | 6 |
| 41/23 | 22/00375-3 | Uppskot um gøtunavn til nýggju útstykkingina í Sandavági | 8 |
| 42/23 | 22/00464-2 | Skótalið Mikkjals á Ryggi søkir um loyvi at brúka gomlu kommunuskrivstovuna í Miðvági | 10 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 43/23 | 22/00481-10 | Umsókn um byggiloyvi at bøta/broyta húsini norði á Heimanhús | 12 |
| 44/23 | 23/00032-10 | Úrslit av útbjóðing av umvæling av Listastovuni | 13 |
| 45/23 | 23/00184-7 | Hiddenfjord søkir um byggiloyvi til Høll M á Fútakletti | 14 |
| 46/23 | 23/00196-2 | Marknavegurin í Vatnsoyrum | 15 |
| 47/23 | 22/00561-4 | Sundurbýti til grundstykki til tøknihús hjá FT Net matr. nr. 227a í Miðvági. | 17 |
| 48/23 | 23/00282-2 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 344a í Miðvági til ummælis | 18 |
| 49/23 | 23/00283-2 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 318a í Miðvági til ummælis | 19 |
| 50/23 | 23/00298-2 | Umsókn um marknaumskipan millum 109a, 35 og 24 í Sandavági til ummælis | 20 |
| 51/23 | 23/00303-1 | EXTRA23_02 Eykaætlan 02 2023 | 21 |
| 52/23 | 21/00345-10 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 232a í Sandavági | 22 |
| 53/23 | 23/00313-3 | Uppskot frá ungdómsráðnum um frítíðarkort | 23 |
| | | | |

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**Kunning**

## 7/23 Mál beind í nevnd 6-23

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 13.06.2023 | 7/23 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 13. juni 2023:**

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

Til støðutakan

## 38/23 Støðutakan til roknskapin fyri 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.06.2023 | 53/23 |
| 2 Býráðið | 13.06.2023 | 38/23 |

**Málslýsing:**

Roknskapurin vísir eitt RLÚ uppá -4.891 mill.kr.

Skattir og avgjøld eru íalt. 120.039 mill. kr.
Rakstrarútreiðslurnar eru íalt. 96.209 mill. kr.
**Rakstraravlopið er 24.101 mill.kr.**

**Løguútreiðslurnar eru íalt. 28.992 mill. kr.**

**Viðmerkingar hjá umsitingini**
Mælt verður til at góðkenna roknskapin.

**Fíggjarnevndin 07. juni 2023:**

Viðmælt at góðkenna roknskapin fyri 2022

**Býráðið 13. juni 2023:**

Einmælt samtykt at góðkenna roknskapin fyri 2022

Formansváttan:___________

VÁGA KOMMUNA

## 39/23 Umsókn um nýtt byggiloyvi á matr. nr. 417g í Vatnsoyrum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 36/23 |
| 2 Býráðið | 13.06.2023 | 39/23 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr. 417g søkir um nýtt byggiloyvi eftir at broytingar eru gjørdar í tekningunum.

Fyrsta byggiloyvi bleiv givið 12.06.2020, og er grundstykki síðan blivið útgrivið og planera.

Søkt verður um eitt frávik, at byggja 49 cm uttanfyri byggifeltið. Umsøkjarin hevur samskift við grannan á matr. nr. 417f, og hava tey vátta, at tað er í lagi við byggingini, ið fellur uttanfyri byggifeltið.

Viðmerking frá umsitingini:
Umsitingin hevur byggimálsviðgjørt tekningarnar, og viðmælir at geva byggiloyvi.

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:**

Viðmæla at geva frávik

**Býráðið 13. juni 2023:**

Einmælt samtykt at taka undir teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 40/23 Uppskot til skipan av økinum á Valloyruni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 01.06.2023 | 10/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.06.2023 | 56/23 |
| 3 Býráðið | 13.06.2023 | 40/23 |

**Málslýsing:**

Umsitingin hevur arbeitt við einum uppskoti til skipan av økinum á Valloyruni.

Ætlanin er at fáa fríðka um Valloyruna, við hentleikum sum parkering til persónsbilar og bussar, ið koma við ferðafólkum. Ætlanin byrjaði í samráð við Visit Vágar, tí stóra talið av ferðafólki og bussum skapa ruðuleikar inni í bygdini.

Verkætlanin er gjørd soleiðis, at hon kann gerast í stigum, og er ein kostnaðarmeting nú gjørd. Í fyrsta stigi er talan um at gera 15 parkeringspláss, grønan dropa og koyriveg. Annað byggistig er grasarmering til bussleið og parkering fram við vøllinum, meðan triðja byggistig er parkeringspláss vestanfyri koyrivegin.



3D visualisering av heildarætlanina, 1. og 2. byggistig

Viðmerking frá umsitingini:
Ynski er at fáa gongd á verkætlanina í ár, so økið er komið ávegis til Vestanstevnuna komandi ár í Sandavági.

Formansváttan:________

Nevndin verður biðin um at taka støðu til málið.

**Vinnu- og havnanevndin 01. juni 2023:**

Minnilutin mælir til at fara í gongd við 1. byggistig.
Meirlutin heldur at uppskotið er gott, og at verkætlanin verður raðfest í mun til aðrar verkætlanir.

**Fíggjarnevndin 07. juni 2023:**

Meirlutin mælir til at fylgja tilmælinum hjá meirlutanum í Vinnu- og havnanevndini.

**Býráðið 13. juni 2023:**

Samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

VÁGA KOMMUNA

# 41/23 Uppskot um gøtunavn til nýggju útstykkingina í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 15.08.2022 | 46/22 |
| 2 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.06.2023 | 41/23 |
| 3 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 47/23 |
| 4 Býráðið | 13.06.2023 | 41/23 |

**Málslýsing:**

Í samband við nýggju útstykkingina á matr. nr. 133k í Sandavági skal nýtt veganavn finnast. Gøtunavnanevndin fyri Sandavág hevur sent tvey uppskot inn til nøvn.

Uppskotini hjá gøtunavnanevndini eru:
Dáagøta
Dáafløta

ella

Berjagøta
Berjafløta

**Nýtt í málinum:**
Nýggj uppskot eru komin inn:

- Dáateigur
- Berjateigur
- Berteigur

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 15. august 2022:**

Samtykt at taka málið av skrá.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. juni 2023:**

Mælt verður til at taka undir við navninum Dáateigur.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:**

Meirlutin mælir til at taka undir við navninum Berjateigur.

**Býráðið 13. juni 2023:**

Samtykt at taka undir við mentanar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:________________

# 42/23 Skótalið Mikkjals á Ryggi søkir um loyvi at brúka gomlu kommunuskrivstovuna í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.08.2022 | 8/22 |
| 2 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 12.09.2022 | 55/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.09.2022 | 59/22 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.06.2023 | 63/23 |
| 5 Býráðið | 13.06.2023 | 42/23 |

**Málslýsing:**

Skótalið Mikkjals á Ryggi er endurstovnað, og søkja tey um loyvi at sleppa at brúka gomlu kommunuskrivstovuna í Miðvág til endamálið hjá teimum at byggja upp eitt sterkt skótalið sum er við til at hjálpa og menna børn og ung at gerast sjálvbjargin og styrkja teirra sjálvsálit.

Nýtt í málinum:
Uppskot til rakstraravtalu er gjørd, sami leistur brúktur sum millum kommununa og Gleim viðv. bygdarhúsinum.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 12. september 2022:**

Mælt verður til at geva loyvi.

**Fíggjarnevndin 21. september 2022:**

Samtykt at geva Skótaliðnum atgongd til húsini. Við tí treyt at annað virksemi eisini kann húsast í hølunum. Umsitingin ger eina skrivliga avtalu við Skótaliðið og kunnar avvarandi nevndir.

**Fíggjarnevndin 07. juni 2023:**

Avgjørt at málið verður tikið av skránni.

**Býráðið 13. juni 2023:**

Einmælt samtykt at taka undir við avtaluni.

Formansváttan:__________

# 43/23 Umsókn um byggiloyvi at bøta/broyta húsini norði á Heimanhús

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 37/23 |
| 2 Býráðið | 13.06.2023 | 43/23 |

## Málslýsing:

Hagastýri fyri Heimanhús á Fjøllum søkja um byggiloyvi at Bøtta um og broyta húsini Norðuri á Heimanhús.

Talan er um at byggja eitt hús á eina verandi grund, við køki, kamari og vesi. Húsið skal brúkast til røkt av haganum og fyri at draga tilhoyrandi fólk til, so áhugin fyri haganum veksur.

Ástaðarfundur hevur verið saman við friðingarnevndini hjá Vága Sýslu, ið hevur havt málið til hoyringar. Málið er hjá Yvirfriðingarnevndini í løtuni.

Viðmerking frá umsitingini:
Umsitingin hevur byggimálsviðgjørt umsóknina, og metir bygningin vera eitt gott inntriv á økið og hjálp til røkt av haga, og viðmælir at geva loyvi við tí treyt at Yvirfriðingarnevndin gevur sítt loyvi, og at góðkend niðurseyðringarskipan verður gjørd í samband við byggingina.

## Tekniska nevnd 05. juni 2023:

Viðmælt við viðmerkingum frá umsitingini.

## Býráðið 13. juni 2023:

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

# 44/23 Úrslit av útbjóðing av umvæling av Listastovuni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 43/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.06.2023 | 59/23 |
| 3 Býráðið | 13.06.2023 | 44/23 |

**Málslýsing:**

Fíggjarnevndin samtykti tann 15.02.2023 at arbeiðið at umvæla Listastovuna skuldi bjóðast út.

Arbeiðið bleiv boðið út til 7 arbeiðstakarar. Licitatión var á kommunuskrivstovuni mánadagin 03. apríl, og inn komu tvey tilboð.

Sp/f JPH v/Jens Paula á Høgabóli – Spf E.P-smíð v/ Egil Petersen kr. 812.000,-

Arbeiðsmaðurin kr. 729.400,-

Báðir prísir eru uttan mvg.

Kostnaðarmetingin var kr. 791.175,- uttan mvg.

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:**

Mælt verður til at taka av lægsta tilboðnum

**Fíggjarnevndin 07. juni 2023:**

Viðmælt at taka undir við Teknisku nevnd.

**Býráðið 13. juni 2023:**
Ásla Leila Johansen luttók ikki í viðgerini av málinum.

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 45/23 Hiddenfjord søkir um byggiloyvi til Høll M á Fútakletti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 01.06.2023 | 9/23 |
| 2 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 46/23 |
| 3 Býráðið | 13.06.2023 | 45/23 |

**Málslýsing:**

Hiddenfjord hava sent umsókn um byggiloyvi til nýggja høll á Fútakletti.

Vinnu- og havnanevndin samtykti tann 04.04.2023 at geva graviloyvi til høllina nú søkt verður um byggiloyvi til.

Umsitingin hevur fingið hjálp frá ráðgeva til at byggimálsviðgera umsóknina. Mett verður at byggiloyvi kann gevast, tó eru manglar, serliga viðvíkjandi brandviðurskiftunum.

Viðmerkingar frá umsitingini:

Um byggiloyvi verður givið má tað vera við tí treyt, at viðmerkingar frá byggimálsviðgera og rættaðar tekningar koma leypandi, og at nýtsluloyvi skal vera komi frá byggivaldinum áðrenn bygningurin verður tikin í brúk.

**Vinnu- og havnanevndin 01. juni 2023:**

Viðmælt at geva byggiloyvi við teimum viðmerkingum, sum eru frá umsitingini.

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:**

Tekniska nevnd tekur undir við Vinnu- og havnanevndini

**Býráðið 13. juni 2023:**

Einmælt samtykt at taka undir við vinnu- og havnanevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 46/23 Marknavegurin í Vatnsoyrum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 44/23 |
| 2 Býráðið | 13.06.2023 | 46/23 |

**Málslýsing:**

Karl Jóhan Nielsen hevur enn einaferð vent sær til kommununa og biðið um at fáa málið viðv. breiddini á Marknavegnum í Vatnsoyrum tikið upp av nýggjum.

Málið um Marknavegin í Vatnsoyrum er eitt gamalt mál, ið bleiv seinast viðgjørt á nevndarfundi í teknisku nevnd 07. februar 2020, har samtykt bleiv at halda fast við avgerðina frá býráðsfundi 28. januar 2019, har tað bleiv samtykt at halda fast í avgerðini um at vegurin verður avlagdur 8 m breid, tí atkoma er til 6 stykkir, sum er sambært Almennu byggisamtyktini. Býráðið metti seg ikki hava heimild at geva frávik í hesum føri.

Í Almennu byggisamtyktini §23 Vegir og leiðingar stk. 1-3 stendur:

1. Vegir í einum býlingi ella bygd verða avlagdir í minst 10 m breidd, av hesum til akbreytir 6,0 m. Byggivaldið kann tó loyva, at til vegir, ið eftir meting tess ikki fara at hava ferðslutýdning, verður avlagda breiddin sett niður í 8,0 m, av hesum til akbreyt 5,0 m.
2. Um vegur bert gevur atgongd til í mesta lagi 5 grundir, kann byggivaldið tó loyva, at avlagda breiddin verður sett níður í 5,0 m.
3. Vendipláss skulu í minsta lagi vera avløgd í 14 m breidd.

Viðmerking frá umsitingini:
Karl Jóhan Nielsen ynskir at fáa endaligt svar viðv. breiddini á vegnum.
Umsitingin mælir til at loyva umsøkjaranum at gera akbreyt á 5,5 - 6 m breidd til 2-1 veg, men ikki at broyta avgerðina um sundurbýti, so framhaldandi er avlagt 8 m breidd til veg. Hetta tí at samsvarar ikki er við veganetið í økinum annars, har ongin vegur yvirheldur krøvini sambært Almennu byggisamtyktini.
Nevndin verður biðin um at taka støðu til málið.

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:**

Viðmælt við teimum viðmerkingum sum umsitingin hevur at gera akbreyt á 6 m breidd.

**Býráðið 13. juni 2023:**

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:________________

VÁGA KOMMUNA

## 47/23 Sundurbýti til grundstykki til tøknihús hjá FT Net matr. nr. 227a í Miðvági.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 39/23 |
| 2 Býráðið | 13.06.2023 | 47/23 |

**Málslýsing:**

Í samband við at FT Net hava bygt tøknihús á matr. nr. 227a í Miðvági, ið Vága kommuna eigur, er semja gjørd millum partarnar, at FT Net keypir økið húsið stendur á.

Talan er um eitt øki á uml 210 $m^2$, har hús og mastur er á, og pláss til parkering. Prísurin er 200 kr./$m^2$ + tinglesingargjald.

Viðmerking frá umsitingini:
FT Net hava tikið av tilboðnum.
Nevndin verður biðin um at taka støðu til málið.

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:**

Viðmælt

**Býráðið 13. juni 2023:**

Viðmælt.

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

## 48/23 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 344a í Miðvági til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 40/23 |
| 2 Býráðið | 13.06.2023 | 48/23 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um sundurbýti av matr. nr. 344a í Miðvági til ummælis.

Talan er um eitt stykki á Miðbrekku á 7270m$^2$, ið verður býtt sundur soleiðis, at, har eini sethús standa í dag verður ein matrikul á 899m$^2$ og ein nýggjur matrikul, niðanfyri sethúsini, ið skal nýtast til grundstykki, verður býttur frá, í 522m$^2$.

Viðmerking frá umsitingini:
Sundurbýti samsvarar við byggisamtyktina.
Nevndin verður biðin um at taka støðu til málið.

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:**

Viðmælt

**Býráðið 13. juni 2023:**

Viðmælt.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

# 49/23 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 318a í Miðvági til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 41/23 |
| 2 Býráðið | 13.06.2023 | 49/23 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um sundurbýti av matr. nr. 318a í Miðvági til ummælis.

Talan er um at býta stykki, har húsið á Rygstún 2 í Miðvági stendur, frá aðrari innangarðsjørð. Matrikulin er 226m$^2$ til støddar.

Viðmerking frá umsitingini:
Matrikulin er í serstøku byggisamtyktini á Ryggi, øki B4.
Sundurbýti broytir onki uppá matrikulin, og er hetta í lagi sambært byggisamtyktini.
Nevndin verður biðin um at taka støðu til málið.

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:**

Viðmælt

**Býráðið 13. juni 2023:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 50/23 Umsókn um marknaumskipan millum 109a, 35 og 24 í Sandavági til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 42/23 |
| 2 Býráðið | 13.06.2023 | 50/23 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um marknaumskipan millum matr. Nr. 109a, 35 og 24 í Sandavági til ummælis.

Talan er um matriklar á merkrunum, har ætlanin er at býta sundur, soleiðis at matr. 109a letur øki, har hjallurin stendur til matr. 35, og síðan verður uttangarðsjørð, ið hoyrir til matr. 109a deild millum matr. nr. 35 og 24.

Viðmerking frá umsitingini:
Umsøkjarnir hava fingið hjálp frá umhvørvisstovuni, so umsóknin samsvarar reglunum.

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:**

Viðmælt

**Býráðið 13. juni 2023:**

Viðmælt.

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

## 51/23 EXTRA23_02 Eykaætlan 02 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.06.2023 | 54/23 |
| 2 Býráðið | 13.06.2023 | 51/23 |

**Málslýsing:**

**Rakstrarjáttan:**

§1. RS112 Val kr. 75.000,-
§1. RS114 Umsitingin kr. 65.000,-
§3. RS31010 Miðgarður kr. 250.000,-
§4. RS410 Skúlin á Giljanesi kr. 70.000,-

**Løgujáttan:**
§4. RS41004 Skúlin á Giljanesi kr. 13.200.000,-
§6. RS61810 Byggibúning kr. 5.000.000,-

**Fíggjarnevndin 07. juni 2023:**

Viðmælt.

**Býráðið 13. juni 2023:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:________

VÁGA KOMMUNA

## 52/23 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 232a í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 13.06.2023 | 52/23 |

**Málslýsing:**

17. maj 2021 samtykti fíggjarnevndin ætlanina at keypa matr. nr. 33 og part av matr. nr. 232a á Merkrunum í Sandavági til parkeringspláss. Keypi av matr. nr. 33 er ávegis.

Avtala er gjørd við eigaran av matr. nr. 232a um keyp av parti, uml. 60m², og nú er umsóknin um sundurbýti klár og undirskriva.

Býráðið verður biðið um at ummæla umsóknina.

**Býráðið 13. juni 2023:**

Viðmælt.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 53/23 Uppskot frá ungdómsráðnum um frítíðarkort

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.06.2023 | 38/23 |
| 2 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 12.06.2023 | 43/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.06.2023 | 64/23 |
| 4 Býráðið | 13.06.2023 | 53/23 |

**Málslýsing:**

Ungdómsráðið fyri Vága kommunu hevur orða eitt uppskot til eitt frítíðarkort fyri børn og ung í aldrinum 3 til og við 17 ár.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. juni 2023:**

Mælt verður til at arbeiða víðari við frítíðarkortinum, og greina kostnaðin og limagjøld hjá ymisku frítíðar- og ítróttarfeløgum. Samstundis eigur at verða hugt eftir stuðulsskipanina til frítíð- og ítrótt.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 12. juni 2023:**
Viðmælt at taka undir við uppskotinum við tí treyt, at eitt loft verður sett á gjøld til hvørt felag.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2023:**

Viðmælt at seta frítíðarkort í verk frá 2024, og hava málið við í fíggjarætlanararbeiðinum fyri komandi ár.

**Býráðið 13. juni 2023:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 19:35

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Dagbjørn Hansen

Rósa Samuelsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Jóhannus Hansen

Jens Gaardlykke

Martin Símonsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan:____________